## DAGSINS MEINING

# Aftur eitt prógv í NATO-málinum

Í síðstu viku staðfesti fyrrverandi verjumálaráðharrin, Hans Engell, í samrøðu við Sosialin, at Føroyar og Danmark høvdu havt so stóran týdning fyri NATO, at tað hevði spart Danmark fyri verjuútreiðslur.

Hans Engell legði kortini afturat, at hetta var tann fjaldi "dagsordanin", og at partarnir ikki settu krónur og oyru á.

Harafturat legði fyrrverandi verjumálaráðharrin dent á, at Danmark var ikki fyri serligum atfinningum, tá Danmark ikki kundi ganga samtyktum í NATO í 80-árunum á møti. Orsøkin var, at NATO-landið kundi spjaða til við nøkrum virðismiklum í Norðuratlantshavi. Fyrst og fremst hugsaði hann um Grønland, har NATO hevur eina støð í Thule, og verjuavtaluna millum USA og Danmark frá 1951 um Grønland.

Samrøðan við Hans Egell stendur í andsøgn til upplýsingarnar, sum forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, gav Føroya-nevndini hjá Fólkatinginum í juni, tá hann segði, at Danmark var ongantíð sloppið undan útreiðslum, tí Føroyar voru ein partur í fráboðanarskipanini hjá NATO.

So er spurningurin, hvør sigur satt, sum Hergeir Nielsen, formaður í Uttanlandsnevndini, ba upp á mál í síðstu viku.

Tað er nú fleiri ferðir staðfest, at fyrrverandi hjálondini hjá Danmark í Norðurhøvum hava havt stóran týdning fyri NATO og tá limagjaldið hjá Danmark skuldi rindast. Vit síggja eisini í biografiini um Jens Otto Krag, sum var uttanríkisráðharri í 50-árunum, at Danmark skákar sær undan, tá kjarnorkuvápn skulu leggjast í Evropa. Danmark sleppur undan at goyma slíka vápn, tí USA hevur fingið loyvi at brúka støðina í Norðurgrønlandi.

Grundleggjandi spurningurin er ikki, hvør sigur satt ella ikki, ella hvussu nógv Danmark møguliga hevur spart. Málið má vera, at Føroyar og Danmark fáa virðiligari samskifti og møguliga avtalu um trygdarpolitikk og uttanríkispolitikk. Sum er, eru Føroyar og Danmark ikki tveir javnsettir partar á hesum øki, og tað er hvørki í samljóð við sjálvstýristilgongdina ella uppskotið hjá Javnaðarflokkinum um sjálvsstýrislóg.

Men landsstýrið er tigandi um hetta mál, tí ósemja valdar millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin. Ein frágreiðing skuldi skrivast fyri meira enn hálvum ári síðani. Eftir ársskiftið verða aðalorðaskifti um trygdarviðurskifti Føroya, sum skuldi enda við nýggjum samtyktum. Men higartil er einki frætt aftur, tí Tjóðveldisflokkurin vil varðveita andan í hernaðarsamtyktunum, samstundis sum Fólkaflokkurin vil hava tær strikaðar.

**Sosialurin**

# Svar til Henrik Old viðv. sparingunum sum forsvunnu: Øravík-Hov tunnilin/Samferðsluhavn

**Regin Hammer**

Góði Henrik Old,

Takk fyri svar til viðmerking mína til viðgerðina av málinum um samanknýting av tveimum samferðsluverkætlanum í Suðuroy. Eg skal ikki gera stórvegis viðmerkingar til rættingina hjá tær av tí at tú ikki gert viðmerkingar til kjarnan í viðmerking míni men heldur tosar um ymiskt annað. Tí má eg ganga út frá at tú hevur misskilt meg, so skal eg royna at greiða frá sjónarmiði mínum einaferð enn.

Takk eisini fyri at tú vísir mær til skriv frá Landsverkfrøðinginum, men eg eri kunnigur við hetta skriv eins og øll hini nevndarskjølini hjá Vinnunevnd løgtingsins ið viðgjørd vóru í hesum máli. Eg má tó loyva mær at rætta uppá teg og vísa á, at tað er ikki landsverkfrøðingurin sum upprunaliga ávísur 15 mió. kr. sparingina, men at landsverkfrøðingurin bert setur fyri soleiðis: *"Um sparingin við ókeypis gróti fyri 200 metur pier verður 15 mió. kr...".* Metingin um tær 15 mió. kr. stavar harafturímóti frá NCC í skrivi til Hergeir Nielsen dagf. 06.02.2003.

Í álitinum til tingmál 49/2002 frá vinnunevnd løgtingsins stendur: *"Sostatt kunnu á leið 45 mió kr. sparast við at knýta hesar báðar verkætlanir saman."*. Víst verður til tvær sparingar sum tilsamans geva umleið 45 mió. kr. Sparing a) er orsakað av at NCC eftir nýggjum uppskoti kann gera Øravík-Hov tunnilin 33 mió. kr bíligari enn Landsverkfrøðingurin. b) Seinna sparingin ið verður ávíst er, at ókeypis grót til havnargerð kann fáast úr tunlinum og at soleiðis kunnu 15 mió. kr. sparast. Latið okkum tí einaferð enn royna at hyggja nærri at hesum báðum sparingum. Ofta hjálpir at seta tølini upp fyri at skilja betur samanhangir millum tey, so eg fari at gera eina roynd at vísa at sparingarnar sum ávístar í áliti vinnunevndarinnar ikki hoyra heima í hesum áliti.

**Sparing a)**

Sí talvu I

Sum sæst av tabellini, og sum nevnt í fyrru viðmerking míni, so kann hendan sparing fremjast sjálvt um so ongin samferðsluhavn varð gjørd. Og hendan sparing kann eisini fremjast um tunnilin verður byrjaður næsta ár ella um 10 ár. Orsøkin at NCC sigur seg klára at gera tunnilin 33 mió. kr. bíligari er ikki tí at ein samferðsluhavn tilfeldigvís verður bygd nærhendis, men tí at teir m.a. meta seg hava betri tøkni og kunnleika. Legg til merkis, at eg sigi ikki at sjálv sparingin á tunlinum ikki kann fremjast (sum tú tykist halda), men bert at tann sparingin als ikki verður framd sum úrslit av at verkætlanirnar verða knýttar saman. Sparingin hevur tí onki við málið um samferðsluhavn í Trongisvágsfirði at gera, á sama hátt sum ein møgulig sparing uppá t.d. Norðoyatunnilin heldur onki hevur við samferðsluhavnina at gera.

**Sparing b)**

Grundgeving vinnunevndarinnar aftanfyri hesa sparing er skilabetri, men her verður tó ikki hædd tikin fyri offurkostnaðinum ella alternativ-kostnaðum. Tí er roknistykkið ikki fullfíggjað sum er.

Í sambandi við spurningin um at nýta grót úr Øravík-Hov tunlinum til samferðsluhavnina skal líka eisini nevnast sum ein parantes, at sera ivasamt er um grótið úr Øravík-Hov tunlinum, sum NCC skjýtur upp yvirhøvur kann nýtast til brimgarð vegna vánaliga grót-góðsku. Hóast serkøn fólk í landi okkara eru væl før at meta um hetta, liggur onki til skjals fyri at vinnunevndin hevur fingið frágreiðing frá serkønum um hendan spurning. Men um nú allíkavæl verður gingið út frá at áðurnevnda tal uppá 15 mió. kr kunnu tølini setast upp í niðanfyri nevndu talvu.

Síð talvu II

Av talvu II omanfyri sæst at talan kann verða um eina sparing uppá 0-2 mió. kr av at nýta grót úr Øravík-Hov tunlinum til samferðsluhavnina. Hendan sparing er ikki heilar 15 mió. kr av tí einføldu orsøk, at tað eru onnur alternativ til grótnýtsluna. Her kundi t.d. verið hugsað um aðrar havnar- ella vegagerðir í oynni sum eru farnar ella fara í gongd. Men talan kann eisini vera um havnargerðir ella aðrar verkætlanir innan næstu framtíð. Um so er, skal grótið koyrast eina ferð eyka, men tað skuldi nú heldur ikki kostað nógvar milliónir.

Sum tú rætt sigur, so visti eg ikki av at Lopranshagi er fullur í gróti. Men hetta at grót ‘hongur á trøunum’ í Suðuroy, og at grót tískil møguliga onki søluvirði hevur í Suðuroy, broytir tó bert roknistykkið soleiðis at øll tølini í talvu II minka (eisini nevnda sparingin uppá 15 mió. kr.) - ikki lutfallið teirra millum.

Hetta var einaferð enn grundgevingin fyri at, at tað sum vinnunevndin segði í áliti sínum *"Sostatt kunnu á leið 45 mió kr. sparast við at knýta hesar báðar verkætlanir saman."* er beinleiðis skeiv nýtsla av tølum, sum í besta føri er villeiðandi. Og so er líka mikið um so málið er viðgjørt á 17 ella 100 fundum.

P.S. Um tú ætlar at svara hesari aðru viðmerking aftur, so vil eg heita á teg samstundis um at greiða frá bakgrundini fyri og útrokningini av teimum15 mió. kr sparingunum sum NCC hevur postulerað fyri vinnunevndini.

Talva I

| | Ikki samanknýttar verkætlanir | Samanknýttar verkætlanir | **Sparing av at knýta verkætlanir saman** |
|---|---|---|---|
| Øravík-Hov tunnil samb. LV | 125 mió. kr | 125 mió. kr | **0 mió. kr** |
| Øravík-Hov tunnil samb. NCC | 92 mió. kr | 92 mió. kr | **0 mió. kr** |
| **Sparing við at taka av tilboði frá NCC** | **33 mió. kr** | **33 mió. kr** | **0 mió. kr** |

Talva II

| | Ikki samanknýttar verkætlanir | Samanknýttar verkætlanir | **Sparing av at knýta verkætlanir saman** |
|---|---|---|---|
| Landið fær ókeypis grót úr tunli (sparing) | - | 15 mió. kr | **15 mió. kr** |
| DØMI 1. Landið selur grót úr tunlinum til aðra verkætlan (inntøka)<br>DØMI 2. Landið selur grót úr tunlinum um t.d. 5 ár (inntøka) | 15 mió. kr<br>13 mió. kr* | - | **13-15 mió. kr** |
| **Samlað sparing** | **13-15 mió. kr** | **15 mió. kr** | **0-2 mió. kr** |

* Hetta tal er roknað sum tíðarvirðið av 15 mió. kr um 5 ár við einum mettum almennum diskonteringssatsi uppá 3% reelt. Her er ikki íroknaður kostnaður at koyra grótið eina ferð eyka.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# BROT ÚR BRÆVI (IIX)

**Heri Mohr**



"(…) Hetta gjørdist heldur drúgt bræv, men áðrenn eg endi, fari eg at skriva

tær brot úr einari kladdu, sum Pætur gav mær til láns seinasta leygarkvøld.

Hann var í tí rætta essinum. Saman við einum vinmanni, sum eg ikki kendi, skemtaði og sang hann til langt út á náttina. Teir høvdu verið í brúðleypshúsi, so tú kanst ætla, at lagið var gott. Hann segði, at hann fantaseraði við eini skemtiligari stuttsøgu. Kladduna vil hann hava aftur sum skjótast, men hann bað meg skriva tær brot úr henni, tí, sum hann segði:- eg vil fegin hava Jógvansa ummæli.

Tað, sum Pætur bað meg skriva tær úr kladduni, er í stórum soljóðandi (sumt er

illa lesandi og tí ikki tikið við):

**"(…)Av bók um politikk**
**tú teg**
**kanst læra mangt**
**at kanna,**
**men leiða land á rætta**
**veg,**
**til tað krevst meir og**
**annað(…)"**

Hendan niðurstøðan hjá Holberg í sjónleikinum **Hin Politiski Kannustoypari** rennur mær í hug, tá ið eg lesi greinir hjá H. Tær eru so orðaríkar og áhaldandi og merktar av betrivitan og læring, at tað danska hugtakið *en seminarist med delingsfører uddannelse,* sum ein háskúlamaður skemtiliga plagdi at taka til, dettur mær á tunguna.

Ein bókaormur í bygdini K, ið lesur hvørja bók og hvørt blað, sum hann fær hendur á, tók nakað soleiðis til: -Nei, góðin, eg kenni H, hann er so avbera klókur, hevur eitt forsligið høvd. Men um hendan sama bókormin verður sagt, at hann er so klókur, at honum nýtist einki høvd.

Satt er tað, H veit nógv, og hann líkist so statt ikki Sokrates, sum segði seg einki vita. Forvitna sjónvarpið plagar at tráspyrja H um líkt og ólíkt. Uttan mun til um tað so er løgfrøði, fiskifrøði, havfrøði, samfelagsfrøði, mentafrøði, fløkt politisk umsiting, snyrlaspurningar í oljumálum og so sjálvandi, hvussu trupul politisk mál upp á skilabesta hátt kunnu fáast frá hondum. Alt hevur hann greitt og sjálvsagt svar uppá. Ein multifrøðingur av teimum sjáldsomu. Ja, ein sonn megavitvera.

Og at skriva er hjá honum eingin kunstur. Tað liggur væl fyri. Til dømis hevur hann sannførandi greitt frá, at búskaparvøksturin her í Føroyum er so øðisligur, nú vit í mong ár hava havt loysingarsamgongu, at nakað líknandi ongantíð er komið fyri í Føroya søgu. Men hann átti eisini at greitt okkum frá, hví ávøksturin gjørdist so søguleysa góður.

Mundi tað ikki vera tað óvanliga nógva, sum fiskurin eina tíð gav og tað, at ongantíð í Føroya søgu hevur landskassin fingið so nógv úr ríkiskassanum, sum meðan loysingarmenn hava rátt fyri borgum, áðrenn teir í ovfarakáti fóru at tveita almennan pening fyri borð?

Og hví man hann siga, at vit mugu finna føroyskar loysnir til eina røð av málum. Hugsar hann sær, at løgtingsmenn og annað klókt fólk við lupp í hendi skulu venda bøkk og stein millum fjalls og fjøru og har koma fram á lampuna hjá Aladdin? Rætt er tað, at hann, sum leitar, hann finnur, men tað er neyðugt at vita, hvat leitast skal eftir, um ikki alt skal enda í einum hurlivasa.

Jú, skrivandi maður er hesin H og tað við lít. Serstakliga í bløðunum er hann at síggja, men tíðum er hann torskildur hjá vanligum fólki at lesa.

Í okkara húsi verða øll bløðini lisin, men Gamla Snimma og Ungi Fregi eru so óhandaliga stór, at tey fríggjadagarnar, tá bæði koma út, verða lisin víðopin á køksgólvinum. Seinasta fríggjadagin varð eldur í koluni. Tú kanst ímynda tær alt í einum ruðuleika: Hin gamla strevaðist við døguðragerð, tvey væl buðlaði lógu á gólvinum og lósu bløðini hálvhart hvør í sínum lagi, úr skúlanum vóru trý komin gorðhungraði, og sjálvur sat eg og grenjaði ótolin á bríkini, og undir henni hoyrdist murr og mjarr frá hundinum og kettuni. Óli lá og las eina grein hjá H, og á somu síðu var mynd, sum við kettueygum kanska líktist einari rottu, tí alt í einum leyp kettan eftir "rottuni", og hin gamla gjørdist so kløkk, at hon misti fatið við øllum døgurðanum á gólvið, og sumt av tí endaði í kjaftinum á hundinum. Alt fór upp at rópa og gartera. Óli bannaði upp á, at H-sa nógva skriving og myndin hevði alla skyldina. Hann hevði roknað út, at við hasum skrivingarlagnum brúkti H í minsta lagi 25 fermetrar av pappíri um árið, og aftrat hesum skuldu leggjast aðrar fimmogtjúgu til brævakassan GÓÐARÁÐ. Um skrivarin er líka kringur við einum haka sum við kúlu penninum, so hevði tað ikki tikið honum langa tíð at velt upp úr nýggjum og harvið lagt haldgott støði til sjálvberandi búskap í okkara landbúnaði. Í øðini tveitti Óli kettuna út og rýmdi sjálvur á dyr.

Og so er H eldhugaður at selja, privatisera, allar almennar ognir., sum hava nakað virði: Jørð, banka, flogfelag, fiskavirkir og kanska eisini heilsuverk og almannaverk, til tess at fíggja ta endaligu pro klamatiónina av tjóðveldinum. Kanska verður hann onkuntíð kanóniseraður sum ein annar Gøtu Tróndur ella Nólsoyar Páll, og sum slóðbrótandi undangongumaður verður hann tá kanskaeisini heiðraður í øðrum londum?

Vit kunnu ímynda okkum, at eitt bílæt av honum fer at hanga á einum veggi í House of Lords millum krígshetjuna Kitchener og skrøggaran Poul Juul, sum við vilja rendi á ein fígginda kavbát, so at hann sakk. Hatta var so tað, ið Pætur bað meg skriva tær úr kladduni.

Eg lesi í bløðunum, at landsstýrismaðurin við fíggjarmálum er av teirri áskoðan, at peningurin, sum ríkiskassin letur til sjúk, avlamin og gomul, er táta, sum eigur at verða beind burtur sum skjótast. Hetta er so eitt uppískoyti til tað, sum aðrir á sama báti hava navngivið olmussu. Og hetta er so eisini tann virðingin føroyskar familjur og støk fáa frá teimum,sum í løtuni ráða fyri borgum í Føroyum.

Nú vita vit tað, góði Jógvan, at tann hjálpin, sum vit higartil hava fingið á Ríkishospitalinum og tíverri ikki kunnu vera fyri uttan, er olmussuhjálp og táta. Men tað verður kanska borið soleiðis í bandi, at hendan olmussutilveran med alla verður steðgað, tí føroyingar í teirra eygum als onga serlæknahjálp hava fyri neyðuni - úr Danmark.

Eg havi annars hoyrt, at "Høgnagarpar", kórið sum sang hitt minniliga kvøldið á Regensuni í Keypmannahavn, hevur fingið navnabroyting: **F**relstu **F**rælsu **F**øroyar (**FFF**), og at teir umhugsa at fara til Keypmannahavnar at hava morgunandakt uttanfyri Ríkishospitalinum (kl. 7). Sungið verður "Morgenstund har guld i mund", og andaktin endar við eyðkennissanginum:

**Vinstra og høgra, vinstra**
**og høgra**
**tað er rætta parið.**
**Nú er tað væl,**
**øll eru sæl,**
**til heljar klandrið farið.**
(Bassarnir við seigligari megi):
**Frelstu Frælsu Føroyar.**

Góða nátt og sov nú so gott, góði Jógvan."

Kærar heilsur frá

**okkum 5.**
**Kona tín**

# Dramaverkstaðið á uttanlandaferð við sjónleiki

1. august fer ein sjónleikarabólkur frá Dramaverkstaðnum í Havn til Karleby í Finlandi á norðurlendska- og baltiska barnasjónleikarastevnu. Hendan barnasjónleikarastevnan, sum kallast „Barn spälar för barn" er annað hvørt ár, og er hetta onnur av sínum slag. Dramaverkstaðið luttók eisini fyrstu ferð hendan stevnan var í 2001, tá var hon í Svøríki.

Tað eru 11 børn úr 11 til 13 ár, sum manna bólkin.

Tey hava síðan oktober 2002 fingið frálæru í drama og teatur eina ferð um vikuna á Dramaverk-staðnum. Frá umleið december byrjaðu tey so at venja sjónleikin "Ikki eitt orð um morð", sum var frumsýndur í mai 2003 og aftur á Barnasjónleikarastevnuni 17. mai í Havn.

Umleið helvtin av børnunum eru sokallaðir gamlir næmingar, t.v.s. tey hava gingið á Dramaverkstaðnum í 1 ella fleiri ár, onnur byrjaðu síðsta heyst.

Umframt at spæla sjónleik skulu børnini uppliva nógv annað, tey skulu til setanina sum verður á býartorginum 2. august, á workshoppir, útferðir, veitslur og í sjónleikarskrúðgongu. Til Skrúðgonguna hava børnini eisini fyrireika seg, við sangum, violinspæli og at ganga á stúltum. Ja, tey hava havt úr at gera og eru sera spent at fara avstað.

Tað er av stórum týdningi at børn og ung sleppa at royna seg millum børn og ung úr øðrum londum, tey mennast av hesum og finna eisini út av hvørjum støði tey sjálvi eru á, tey fáa íblástur og ikki minst nýggjar vinir. Børnini eru eisini greið yvir, at hetta er ein møguleiki fyri at Føroyar vera kendar uttanlanda, og vit á Dramaverkstaðnum hava eftir hondini góðar royndir í so máta, tí einki er meira sannheit enn at: "Tað liggur altíð ein sólglæma yvir børnum" (kvæði)

Vit á Dramaverkstaðnum takka øllum sum hava stuðla okkum við hesi ferðini.

